# Skráin fyri jazzfestivalin klár

**Nú er skráin klár fyri jazzfestivalin í Havn í summar og mangt forvitnisligt er á skránni kring um í høvuðsstaðnum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í mong ár, heili 20 ár, var tað Tórshavnar Jazz-, Fólka-, og Bluesfestivalur, ið merkti Havnina hvørt summar og hildið vað til í Norðurlandahúsinum. Brandur Øssursson stóð á odda. Nú hann hevur lagt frá sær, hava onnur tikið við og nú eitur tað Havnar Jazzfestival.

Og ein broyting er eisini, at nú verða tiltøk kring alla Havnina. Skráin fyri nýggja festivalin er komin og mangt forvitnisligt er á skránni.

Skráin er henda:

**Mánadagur 28. juni**
VERTSHÚSIÐ KL 2100:
SPÆLIMENNINIR (FO/S/DK)

**Týsdagur 29. juni**
GROTTO 1300-1800
KANNASTE & OJAJÄRVI (FIN)

NIELS FINSENS GØTA KL 1500
BÚI DAM QUINTETT feat. KÁRI SVERRISSON (FO)
NICHOLAS HILL AND THE UNIVERSALS (DK)

NORÐURLANDAHÚSIÐ KL1930
EIVØR PÁLSDÓTTIR (FO)
KANNASTE/OJAJÄRVI-QUARTET (FIN)
ENEKK (FO)
SPÆLIMENNINIR (FO/S/DK)
NEW JUNGLE ORCHESTRA (DK)

CAFÉ NATÚR KL 2100
ESKIL ROMME & SPÆLIMENN (FO/S/DK)

KLUBBIN KL 2230
PLÚMM (FO)

**Mikudagur 30. juni**
NIELS FINSENS GØTA KL 1500
KRÆKLINGAR (FO/DK)

LISTASKÁLIN KL 1900-2100
HANS PETUR KVINTETT (FO)
HANUS JOHANSEN (FO)
RUN (FO/IS)

VERTSHÚSIÐ KL 2100
JAMES OLSEN & JAM SESSION HOUSE BAND
KLUBBIN KL 2200
YGGDRASIL (FO/S) & NEW JUNGLE ORCHESTRA (DK)
KLUBBIN KL 2300
U.L.C. & FOLK JAM

**Hósdagur 1. juli**
GROTTO 1300-1800
NEW JUNGLE TRIO (DK)

NIELS FINSENS GØTA KL 1500
KLACK (FO)

SJÓNLEIKARHÚSIÐ KL 1900-2100
TÓMAS R. EINARSSON KVARTETT (IS)
TJANT (FO/S)
NICHOLAS HILL AND THE UNIVERSALS (DK)

CAFÉ NATÚR KL 2100
KRÆKLINGAR (FO/DK)

VERTSHÚSIÐ KL 2100
U.L.C. KVINTETT (DK/IRL)

KLUBBIN KL 2230
TÓMAS R. EINARSSON KVARTETT (IS)

**Fríggjadag 2. juli**
NIELS FINSENS GØTA KL 1500
TÓRSHAVNAR BIG BAND (FO)

SJÓNLEIKARHÚSIÐ KL 1900
MEGA TSUNAMI (N)
HØGNI LISBERG BAND (FO)

PLÚMM (FO)
BÚI DAM QUINTETT feat. KÁRI SVERRISSON (FO)

VERTSHÚSIÐ KL 2300
HEADACHE BLUES TREO (FO)

KLUBBIN KL 2300
PETER ROSENDAL / MORTEN ANKERFELDT DUO (DK)

**Leygardag 3. juli**
NIELS FINSENS GØTA KL 1300
HØGNI LISBERG (FO)

SJÓNLEIKARHÚSIÐ KL 1900
TÓRSHAVNAR BIG BAND (FO)
U.L.C. KVINTETT (DK/IRL)
GóGóBLUS (FO)
GERALDINE HUNT & THE ARNOLD LUDVIG TRIO (KANADA/FO)

VERTSHÚSIÐ KL 2300
KLACK (FO)

KLUBBIN KL 2300
MEGA TSUNAMI (N)
HØGNI LISBERG BAND (FO)

**Sunnudag 4. juli**
GROTTO 1300-1800
ANDERS HAGBERG (S)

LISTASKÁLIN KL 1600
SIGRID RASMUSSEN & GUNNAR GUTTESEN (FO)


**MASKINUR TIL SØLU**

**BRÚKT HYDREMA 906**
Árg. 1991 - 6000 tímar
**Tilboð kr. 295.000,- u/mvg**

**BRÚKT HYDREMA 808S**
Árg. 1989 - 5965 tímar
**Tilboð kr. 150.000,- u/mvg**

**NÝGGJUR CATERPILLAR 303CR**
3,5 tons gravimaskina
**Tilboð kr. 289.000,- u/mvg**

*Fyri kundar okkara hava vit til sølu:*

**BRÚKT CATERPILLAR 320**
20 tons gravimaskina
Árg. 1996 - 8500 tímar
Nýggjur undirvognur
**Prísur kr. 325.000,- u/mvg**

**BRÚKT JCB 803**
3,5 tons gravimaskina
Árg. 1998 - 5840 tímar
Hettar er skift: gummiband, svingmotorur, hydraulikkpumpa, bússningar í stikki, bumm og skuffa
Skuffan, 60 cm og skjótskift frá Viby Jern
**Prísur kr. 99.000,- u/mvg**




**P/F ALMA Maskinverkstaður & Smiðja**
Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn
tel 31 58 90 · fax 31 35 00 · jan@alma.fo


## VIÐMERKINGAR

# Skattafrádrátturin hjá sjómonnum


**Alfred Olsen**
*Løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin*


**"Tað er skeivt, at sjómenn fáa verandi skattafrádrátt", boðaði formaður Tjóðveldisfloksins frá í seinastu viku til Berlingske Tidende, og ein tingmaður floksins hevur fyrr boða frá á løgtingsins røðarapalli, at skattafrádrátturin hjá sjómonnum eigur at takast av.**

**Mótvegis Tjóðveldisflokkinum, sum vil avtaka sjómannafrádráttin, vil eg at okkara sjómenn /kvinnur, undir verandi skattaskipan, skulu varðveita galdandi frádrátt í skattinum.**



### Ráðstevnan í Keypmannahavn

Tjóðveldisflokkurin (sum ein partur av Norðuratlantsbólkinum) skipaði fyri eini ráðstevnu í "kongens København", har millum annað frádrátturin hjá føroyskum sjómonnum var viðgjørdur.

Tjóðveldisflokkurin velur harvið at viðgera føroysku sjómenninar og skattafrádráttin hjá teimum niðri á Kristiansborg, ístaðin fyri í Føroyum. Og tað sum situr eftir hjá teimum sum hava luttikið á ráðstevnuni er, samb. Christian Th. Dahl, "at sjófólk okkara skúmar fløtan" og "at Føroyar eru eitt skattaparadís fyri sjófólk¨.

Hesum eri eg fullkomiliga ósamdur í, og meti, at ráðstevnan hevur verið til skaða fyri sjófólk okkara og umdømi teirra. Tí ein ráðstevna, sum sigur, at sjófólkið í Føroyum "skúmar fløtan", er beinleiðis villleiðandi.

### Innløgufólk

Veruleikin er tann, at sjálvt um sjófólkið ber høvuðsbyrðarnar, tá talan er um at skaffa inntøkur til tað føroyska samfelagið, so fáa tey bert sín avmálda part av køkuni, sjálvt um tey eru okkara innløgufólk.

Í Føroyum er fiskivinnan høvuðsvinnan, sum vit liva av, og gongur tað væl í fiskivinnuni, gongur tað eisini væl í tí føroyska samfelagnum.

### Paradís

Ráðstevnan, sum m.a. Tjóðveldisflokkurin skipaði fyri, hevur eisini teknað tað myndina av okkara sjófólki, at tey liva eina "skattaparadís" tilveru.

Her fremur ráðstevnan "bakbit" á okkara sjófólk, tí hvørki inntøkan, ella skattafrádrátturin (nógv sjófólk gjalda 50% í skatti) ella sjálvt sjólívið er nøkur paradístilvera, men eitt støðugt sakn og stríð.

At vera til fiskarí í mánaðir á Flemmich Kap, Irmingarhavinum, Barenshavinum, Svalbard, Íslandi ella at fiska undir Føroyum, er ongin paradís-tilvera hjá sjófólki ella familjum teirra.

### Tjóðveldisflokkurin

Formaður floksins sigur tað vera skeivt, at sjófólkið fær "frádrátt í skattinum" men at hann ikki fær undirtøku fyri at avtaka frádráttin í Føroyum.

Men ráðstevnan á Kristiansborg, sær út til at hava haft tað ávirka á einkultar danskar politikkarar, at teir nú tosa um at minka "blokkin", tí tað føroyska sjófólki "skúmar fløtan" og livir eina "skattaparadís" tilveru.

Harvið hevur Tjóðveldisflokkurin megna, at "misbrúkt" okkara sjófólk til at standa sum orsøkin til, at danskarar umhugsa at minka blokkin niður í einki.

Ætlanin hjá Tjóðveldisflokkinum viðførir, at allir føroyingar skulu gjalda meira skatt (eini 8-10 %) og serliga hart rakar hetta sjófólkið, sum harumframt missir skattafrádráttin.

Í míni verð er ætlanin hjá Tjóðveldisflokkinum fíggjarliga óforsvarlig og vil vera til ógævu fyri okkara sjófólk.

# Orka í útnorði

TÍÐINDASKRIV

Evnisráðstevna útnorðurráðsins um orku, sum verður í Reykjavík og Svartsengi í døgunum 8. til 10. juni 2004, skal kanna møguleikarnar fyri betri nýtslu av teimum ymisku orkukeldunum sum eru í útnorði, og sum higartil ikki hava verið nýttar optimalt. Føroyar, Ísland og Grønland fara í fyrsta lagi at kunnu um royndirnar á økinum, og síðani verður orðaskifti um alternativar og nýggjar orkukeldur.

Luttakarar á ráðsstevnuni eru m. o. orkuráðharrar/landsstýrismenn: Johan Lund Olsen úr Grønlandi, Valgerður Sverrisdóttir úr Íslandi og Bjarni Djurholm úr Føroyum.

Ráðstevnan fer at gera orkupolittiskan status fyri økið, við innleggum frá m.a. orkustýrunum í londunum, Norðurlandaráðnum, Ministararáðnum og norska stórtinginum. Gestarøðarar verða úr Grønlandi, Íslandi, Føroyum, Noregi og Danmark. Eisini eru við á ráðstevnuni ymiskir felagsskapir, ið eru við til at geva innlit í og leggja dent á evnir, sum m.a. fevna um geotermiska orku, vindorku, vatnorku, brintorku og alduorku. At enda fara orkuráðharrar/landsstýrismenn at leggja fram síni sjónarmið fyri framhaldandi samstarvi á økjunum.

Høvuðsendamálið við ráðstevnuni er at leggja upp til samstarv um framtíðarútlitini fyri praktiskari nýtslu av nýggjum formum til framleiðslu av orku, har serligur dentur verður lagdur á varandi orkuformar. Eisini verður orðaskifti um politisku avbjóðingina við tí endamálið at stovna ein "platform", har londini í útnorði í felag kunnu samstarva um teir møguleikar, sum hava týdning fyri eitt aktuelt samstarv á økinum.

Útnorðurráðið fer serliga at hyggja eftir teimum ítøkiligu samstarvsmøguleikum, sum Ráðið fer at orða í einum tilmæli til stjórnirnar/landsstýrini í útnorðið.

Útnorðurráðið er ein samstarvsfelagsskapur millum tingini í Føroyum, Grønlandi og Íslandi. Í ráðnum eru 18 tingmenn, 6 úr hvørjum landi. Ráðsformaður er Jonathan Motzfeldt, landstingsformaður, næstformaður er Birgir Ármansson, altingsmaður, og annar næstformaður er Henrik Old, løgtingsmaður.






Tað er ikki long tíð, áðrenn EM-kappingin í fótbólti fer á rull. Ivaleyst er spenningurin undan hesum stórur hjá flestu fótbóltshugaðum føroyingum, men nú kann hesin gerast enn størri.

Saman við Kiosk Steinatún fer Sosialurin nevnliga at skipa fyri einum EM-spæli, har hópur av góðum vinningum standa upp á spæl. Og vinnarin fær einki minni enn eina fótbóltsferð eftir egnum ynski í Europa, soleiðis at til ber at vitja hjá júst tí liðnum, sum liggur tínum hjarta nærmast.

Hjá luttakarunum ræður her um at gita, hvussu útfallið í teimum 31 dystunum í EM-kappingini verður. Hetta verður gjørt við at fylla út veddingarseðlarnar, sum verða at fáa í blaðnum undan og undir EM-kappingini, og síðani skulu hesir sendast inn. Men fyrst skal liðið ella liðini hjá tær teknast til kappingina við niðanfyristandandi haldaralepa.

**Eru ivamál, ber altíð til at ringja og spyrja seg fyri, og skal hetta gerast á tlf. 22 01 06**

## VINNINGARNIR

Vinningarnir, sum verða latnir besta veddaranum, eru hesir:

1. Ein fótbóltsferð fyri 2 eftir egnum ynski til dyst í Europa. Latin av MB-Tours
2. Ein ferð fyri 2 til dyst millum FCK-Brøndby, latin av MB-Tours
3. Ein Apex-ferðaseðil frá Atlantic Airways
4. Gávukort frá Føroya Bjór áljóðandi 1.500 kr.
5. Eitt gávukort frá Thomas Dam ítrótti á 1.000 kr.
6. Ein døgurði fyri tvey á Hotel Føroyum
7. Árskort frá HB
8. Árskort frá B36

MB-TOURS
MB-TOURS
ATLANTIC AIRWAYS
Føroya Bjór
P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR
Hotel Føroyar
B36

## REGLUR FYRI EM-SPÆLIÐ

- Tekningarlistin til stóru EM-kappingina í fótbólti verður at fáa í Sosialinum. Ynskir tú at taka lut í kappingini, verður seðilin niðanfyri útfyltur og sendur til niðanfyristandandi adressu. Eisini kann seðilin latast inn hjá Kiosk Steinatún í Havn
- Kostnaðurin fyri luttøku er 100 kr. fyri hvørt liðið. Hvør luttakari kann hava fleiri lið, og skulu hesi tá navngevast við nummari. T.d. Hans Hansen 1, 2 og 3. Luttakarin hevur tá sjálv/ur ábyrgdina av, at navnið á liðnum er rætt útfylt, tá veddingarseðlar verða sendir inn.
- Luttøkugjaldið skal flytast á konto í peningastovnunum. Antin á 6460-168.583.1 ella á 9181-141.977.5. Tilmeldingin er galdandi, tá vit hava skrásett inngjaldið.
- Spælt verður 1X2. Vinnarin er tann, sum tippar flestar dystir rættar. Eru fleiri vinnarar við eins nógvum røttum dystum, verður lutakast millum hesar. Hvørt liðið skal tippa allar 31 dystirnar, fyri at vera við í kappingini.
- Fimm umfør verða í kappingini, og verða veddingarseðlar fyri hvørt umfarið sær at finna í Sosialinum. Fyri hvørt umfar skulu luttakararnir fylla út veddingarseðilin og senda hann inn til niðanfyristandandi bústað innan evstamarkið, sum er prentað á seðlinum. Einans seðlar, sum eru kliptir úr Sosialinum, verða roknaðir sum galdandi. Er talan um avrit av seðlum, verða hesi ikki tikin við.

**Evstamark fyri tilmelding er týsdagin, 8. juni, og eiga bæði luttøkuseðil og gjald at vera okkum í hendi innan ta tíð, um tilmeldingin skal verða galdandi.**

At senda til: EM-spælið, postsmoga 3341, FO-110 Tórshavn

Fornavn ____________________

Eftirnavn ____________________

Føðingardagur ____________________

Lið nr: ____________________

Bústaður ____________________

Postnr. og staður ____________________

Sosialurin & Kiosk Steinatún